# Upphiting á Reyða Torgi

**Tað er altíð serligt at vitja Russland á fyrsta sinni. At vitja Moskva í sambandi við størsta fótbóltsdystin í árinum ger tað eyka forkunnugt. At síggja sítt lið vinna Champions League ger túrin til eitt ógloymandi minni.**

## Ferðafrásøgn



**Heri Simonsen**
heris@sosialurin.fo

Einki land í heiminum hevur meiri skóg enn Russland. Nógvur skógur ger tað møguligt hjá russum at framleiða nógv pappír. Nógv pappír ger tað møguligt at hava eitt tungt pappírsveldið. Og møguliga er miljardatals nøgdin av russiskum viði tann størsta rættvísgeringin fyri hesum sama russiska pappírsveldinum. Og skalt tú til Russlands krevur tað russiska pappírsveldið sítt.

Fyri at kunna vitja Russland skalt tú hava bæði eina innbjóðing, og eitt visum/uppihaldsloyvið, og tú mást gjalda fyri bæði. Tú mást hava eina ferðatrygging, sum er galdandi í minst eitt ár, og býrt tú privat í Russlandi – og ikki á Gistingarhúsi – mást tú fara á eina lokala ferðaskrivstovu og skráseta títt uppihald í Russlandi. Ferðaskrivstovan gevur tær so eitt skjal, sum tú mást hava uppi á tær, meðan tú ert í Russlandi. Umborð á flogfarinum ávegis til Russland má ein útfylla eitt dupultskjal, onnur helvtin skal latast inn tá ein skal til innferðar-passeftirlitið, og hin helvtin skal latast inn til útferðar-passeftirlitið, tá ein er á veg heim aftur. Neyðugt er eisini at hava pass uppiá sær. Sjáldsom og løgin fyribrigdi fyri ein norðurlendskan ferðamann.

Men aftaná 4 fantastiskar dagar í Moskva, og eina ógloymandi fótbóltsfinalu, so vigar tunga russiska skrivstovuveldið kortini ikki nógv ímóti teimum góðu upplivingunum, sum ein vinnur sær við einari slíkari ferð. Tá ein er vaksin upp undir Kalda Krígnum er kortini ikki frítt, at ein hevur nakrar fordómar um landið, sum var høvuðsryggurin í gamla Sovjetsamveldinum, og óttin fyri tí ókenda spælir sjálvandi inn hjá einum, sum bara er kendur við tað norðurlendska og bretska.

### Ivan Eginson

Vit 8 føroyingarnir, sum ferðaðust saman yvir til Moskva, høvdu ein fyrimun fram um aðrar føroyingar, sum vóru til Champions League finaluna. Vit høvdu nevnliga Ivan Eginson, sum ferðaleiðara. Livandi alfrøðin og málgeniið, Ivan Jevgenivitj Moskalenko alias Ivan Eginson er millum mest trúgvu Føroyavinir, sum finnast í hesi verð. Tá tað lá klárt, at antin A-liðið hjá undirritaða, Manchester United ella B-liðið, Barcelona kom at verða annað liðið í finaluni – tíbetur gjørdist tað A-liðið – ringdi Ivan til Mín:

- Heri! Nú mást tú koma til Moskva. Tú hevur onga umbering, eg havi útvega tær eitt atgongumerkið til Champions League finaluna!

Hetta var ov stórt at siga nei til! Ivan ringdi við áminningum nakrar ferðir:

- Hevur tú minst til ferðatrygging? Hevur tú goldið til Aeroflot?

Fyri ein, sum bara hevur ferðast millum norðanlond, Bretland, Týskland og Spania var tað eitt sindur ringt at fata, at so nógv hóvasták verður gjørt burtur úr ferðini hjá einum føroyingi til høvuðsstaðin í heimsins størsta landið. Men týsmorgun 20. juni sótu vit so í Airbus-flogfarinum hjá Aeroflot ávegis úr Keypmannahavn til Moskva. Undirritaði misti passið og ferðaseðilin heim aftur undir setrið, og óttafullur, sum eitt kalda krígsbarn sá eg bæði internering og Gulag fyri mær! Men Eli og Atli bjargaðu passinum og retur-ferðaseðilinum, og eg slapp gjøgnum passeftirlitið í øllum góðum. Ein fyrndarblíður passeftirlitsvørður segði bara: "Oh Denmark" tá hann sá tað sokallaða grøna "føroyska" passið. Hinir 7 hava fylgt leiðini hjá teimum flestu, og hava fingið sær eitt pass upp úr reyðrótarglasinum.




Frá flogvøllinum vóru vit koyrdir til eini sethús, sum foreldrini hjá Ivani eiga. Fyrsta kvøldið upplivdu vit stóran russiskan blíðsskap, har pápi Ivan, Jevgenij serveraði okkum russiskar og grannalonds rættir frá grilluni.

Vitjanirnar á georgiskum og ukrainskum matstovum hóskvøldið og fríggjakvøldið vóru góðar, men kortini ikki kappingarførar við grilluna hjá Jevgenij. Jevgenij gamli stóð á høvdinum fyri okkum hesar 4 dagarnar. Men sum hann so vituliga mintu okkum á: "I have been to the Faroe Islands!"

Ivan hevði sett øðrum russiskum Føroya-vinum stevnu. Myndamanninum, Pavel, diplomatinum, Andrey Melnikov, sum dugir bæði íslendskt og føroyskt, og Dimitri, sum er tann nýggjasti Føroyavinurin. Við borðið var samskift á enskum, russiskum og einum øðrum "verðinsmáli", føroyskum.

### Stóri dagurin

3 av 8 føroyingum halda við Manchester United, hinir 5 halda við Liverpool, Arsenal og Middlesbrough, og svóvu teir óivað betri, enn vit, sum droymdu um ein United-sigur, men kortini vistu, at Chelsea saktans kundi fara avstað við steypinum við teimum stóru oyrunum. Komnir inn til Moskva herjaðu vit á Reyða Torgið. Russiska løgreglan var á varðhaldi, og høvdu teir sett eitt eftirlit upp við inngongdina til Reyða Torgið. Komnir á Reyða Torgið var tað næstan eitt ókenniligt torg, sum var opinberað fyri okkum. Ein graslíkisvøllur var lagdur á Reyða Torgið, har bæði kendir og minni kendir fótbóltsleikarar spældu framsýningar- og vinardystir. Steypið við teimum stóru oyrunum var sýnt fram í einum glasbúri, men bíðiraðin til at síggja steypið var líka lang – ella longri – enn gomlu breyð-bíðiraðirnar í Sovjetsamveldinum, so tað góvu vit upp beinavegin. Kortini fingu vit ferðafelagarnir ein smakk av einari sovjetiskari bíðirað. Tað eydnaðist okkum at sessast við eitt borð á einari italskari matstovu – tó ikki italsk tá tað kemur til tænastuveitingar – Tað gingu heilir 4 tímar frá tí vit bílegdu fyrstu ferð, til vit fingu síðsta bitan niður um. Og hevði Petur Olsen ikki verið staddur í matstovuni, og hjálpt okkum við sínum eysturevropeisku royndum viðv. "tænastustøði", so høvdu vit óivað sitið har enn. Á matstovunum framvið Reyða Torginum vóru bæði Chelsea- og Manchester United viðhaldsfólk, og fleiri komu á lagið at syngja slagsangir. Loksins lidnir á "italsku" matstovuni, sum ikki serveraði sniglar, men har fólk arbeiddu sum sniglar, var tíðin búgvin til at markera Føroyar á Reyða Torginum. Poul Helgi Jacobsen, sum arbeiðir hjá reklamuvirkinum "Karmur" í Gøtu hevði gjørt eitt føroyskt flagg við einum serstøkum sniði. Á teimum niðastu hornunum hevði hann prentað búmerkini hjá Chelsea og Manchester United, og á tí eina ovara horninum hevði hann prentað eitt Føroya-kort, og mitt á hevði hann við hvítum bókstavum ritað "Faroe Islands". Vit breiða so flaggið út á Reyða Torginum fyri at taka nakrar myndir. Knappliga stendur ein rúgva av fólki frá alskyns londum og tekur myndir av okkum og flagginum. Í næstu løtuni koma russar rennandi, sum vilja sleppa uppá eina felagsmynd við flagginum hjá Poul Helga. Tá vit so endiliga vóru lidnir við myndatøkurnar, var tíðin búgvin at fara við metro´ini til Luzniki